Skotar sóknast eftir fiski í Føroyum

Í gjárkvøldið komu almenn umboð og vinnulívsfólk úr Skotlandi til Klaksvíkar at kanna møguleikarnar fyri at keypa fisk í Føroyum

RÁVØRA
Eyðun Klakstein

Skotar mangla rávøru, og tá toskabanni hjá ES kemur í gildi um lítla viku, verður enn minni fiskur at kappast um. Tí eru teir farnir at sóknast eftir nýggjum møguleikum fyri at keypa fisk.

Seks umboð fyri mynduglekarnar og vinnulívið í Aberdeenshire komu í gjárkvøldið til Klaksvíkar, har teir skulu vera um vikuskiftið.

Skotar fara at kanna møguleikarnar fyri at keypa fisk í Føroyum, og teir ætla at vitja nøkur av virkjunum í Klaksvík fyri at kunna seg við viðurskiftini í býnum.

Skotar vitja um vikuskiftið í Klaksvík. Teir eru hugaðir fyri at keypa fisk í Føroyum og koma tí hendanvegin at hyggja eftir umstøðunum

Stuttur steðgur

Á odda fyri skotska ferðalagnum er Ann Bell, sum er fiskivinnusamskipari í Aberdeen Council, og afturat henni er eisini politiskt umboð.

Feløgini hjá fiskakeyparum og framleiðarum í Aberdeenshire hava umboð við í ferðalagnum, og somuleiðis eru tvey umboð fyri Peter & J. Johnstone Ltd. eisini við á ferðini.

Rávørutilgongdin í Peterhead hevur ikki verið nøktandi fyri framleiðararnar, og tí koma skotar nú til Føroya.

Steðgurin í Føroyum verður stuttur, tí longu sunnudagin fer ferðalagið av landinum aftur.

Songrøddin í Klaksvík:

Luttøkan størri enn nakrantíð

Átta luttakarar hava meldað seg til fyrsta undanumfarið í Ársins Songrødd, sum verður í Klaksvík í kvøld

KAPPING
Eyðun Klakstein

Í kvøld verður hol sett á kappingina um at gerast Ársins songrødd.

Fyrsta undanumfarið verður í Klaksvík, og tað verður dansistaðið Logn-brá, sum skal hýsa kappingini.

Átta luttakarar hava meldað seg til kappingina í Klaksvík, og hesi skulu kappast um tvey finaluppláss.

– Vit hava ongantíð havt so nógvar luttakarar í Klaksvík, so tað má sigast, at áhugin fyri kappingini er stórur, sigur Dánial Mariusarson, sum er ein av fyriskiparunum.

Nógv at velja í

Millum luttakararnar í Klaksvík eru onkrir, sum hava roynt seg í kappingini áður.

Báðir finaluluttakararnir úr Klaksvík í fjør – Nicolina Rubeksen og Sólgerð Joensen – verða við aftur í ár, og somuleiðis skal Jógvan á Høvdanum yngri royna seg. Seinast sang hann eina alternativa útgávu av einum Vengaboys-hitti.

Luttakararnir hava fleiri løg enn nakrantíð áður at velja ímillum, og tað halda fyrireikararnir ger kappingina meiri fjølbroytta.

Tað verður tó helst okkurt lag, sum fer at ganga aftur í kappingini, og eitt teirra er Against All Odds, sum Phil Collins skrivaði, og sum Mariah Carey og Westlife hava endurinnspælt.

Eyka umfar

Áhugin fyri Ársins songrødd kappingini er stórur kring alt landið, og fyriskipararnir hava avgjørt, at tað verða tvey innleiðandi umfør í Havn.

Hetta kemst av, at ætlaða undanumfarið varð fullteknað beinanvegin, og tí verður skipað fyri einum eykaumfari.

Innleiðandi kappingar verða eisini í Suðuroy, Vágum og Eysturoynni, og finalan verður í Havn 9. juni.

Útvarp Føroya fer at fylgja kappingini, og ætlanin er bæði at senda okkurt kut beinleiðis frá kappingini og at gera sending aftaná.

Arnfríð Lutsen, ársins songrødd 1998

Looknorth klárt at framleiða

Nýggja kassavirkið í Klaksvík er nú klárt at fara undir framleiðsluna av kassum

VIRKI
Eyðun Klakstein

Nýggjasta virkið í Klaksvík er nú klárt at fara undir sítt virksemi.

Í gjár var móttøka á Looknorth í Klaksvík, og í komandi viku ætlar virkið at fara undir at framleiða kassar.

Um smáar tvær vikur ætlar virkið at kunna lata kassar.

Maskinurnar á virkinum vórðu royndar fyrr í vikuni, og tær riggaðu væl. Á móttøkuni í gjár var eisini ætlanin at royna maskinurnar.

Looknorth liggur á vestara kaiøki, undir liðini á gamla Dávavirkinum.

Trygd tryggjað 20 skip

Síðan tryggingarfelagið Trygd stovnaði eina deild, sum skal taka sær av at tryggja skip, eru 20 føroysk skip tryggjaði í hesum felag

TRYGGING
Jústinus Leivsson
Eidesgaard

– Fyrsta skipið, sum varð tryggjað hjá okkum var nýbygningurin Hvilvtenni og síðan eru fleiri løgd aftur at. Tað er sjálvsagt hørð kapping á marknaðinum, og tá vit fáa eitt skip frá okkara kappingarneyta, so er tað tí at vit kunnu geva eitt betri tilboð, sigur Páll Konoy, stjóri.

– Vit eru komin væl frá byrjan og eg haldi framvegis, at pláss er fyri báðum tryggingarfeløgunum, sigur Páll Konoy, stjóri í sjódeildini hjá Trygd. Hann var fyrr stjóri hjá sjódeildini hjá Tryggingarfelagnum Føroyar. Hann er garvaður á hesum øki.

– Og vit hava longu avgreitt tann fyrsta stóra skaðan. Nótabáturin Norðborg fekk ein sjógv herfyri og sjógvur kom í maskinrúmi. Skipið varð umvælt í Noregi, skaðin er rindaður og skipið hevur verið fleiri túrar síðan, sigur Páll Konoy.

Norðborg gav nýggja tryggingarfelagnum fyrsta skaðan

Góðan sýnsmann

Tað sum hevur størstan týdning hjá einum felag, sum fæst við skipatryggingar, er sýnsmaðurin og Páll Konoy er sera fegin um at hava fingið Finn Christiansen at taka sær av hesum. Finn hevur drúgvar royndir sum sýnsmaður og er eisini avhildin av skipaeigarum. Hann hevur fyrr arbeitt hjá Veritas. Finn Christiansen, sum býr á Skála, arbeiðir sum konsulentur hjá Trygd.

Toskurin heldur prísin

22 tons av toski vóru seld á telefonuppboðssøluni hjá Fiskamarknaði Føroya fríiggjamorgunin og toskurin heldur framvegis prísin. Toskurin fór fyri í meðal kr. 19.90

48 tons vóru tilsamans seld á gólvuppboðssøluni fríggjadagin. Harav vóru meginparturin toskur og svartkalvi. Svartkalvin varð, seldur í meðal fyri kr. 18,73 Prísurin á kalva fall nakað í mun til hósdagin, tá hann fór fyri kr. 47,00 fyri kiloið. Fríggjadagin varð hann seldur fyri kr. 30,00 kiloið

Sæborg, Skrápur, Norðleivur, Gorpur og Faroe Seafood Prime seldu á gólvuppsøluni í gjár.

je

Reiðarar nøgdir við íslandskvotuna

Jørgen Niclasen var í seinastu viku í Íslandi og skrivaði undir sínámillum fiskiveiðusáttmálan millum Ísland og Føroyar. Broytingarnar eru ikki so stórar, men reiðararnir eru nøgdir við sáttmálan

– Tað nýggja í sáttmálanum er, at nú er onki loft á brosmu innan fyri heildarkvotuna upp á 5600 tons. Hetta gevur betri møguleikar hjá línubátunum, sum nú ikki eru nervaðir av, at kvota er sett á brosmuna. Eisini eru vit fegnir um, at vit varðveittu kalvakvotuna upp á 80 tons. Hon er nóg stór, tí í fjør veiddu vit bert 57 tons. Tveir útróðrarbátar veiddu kalva undir Íslandi í fjør, sigur Jákup Sólstein, formaður í reiðarafelagnum.

Føroyingar kunnu eisini fiska 10.000 tons av lodnu í íslendskum sjógvi, tá teir fiska lodnu í Eysturgrønlandi og hetta er ein fyrimunur fyri nótabátarnar, heldur formaðurin í Reiðarafelagnum.

je

Oljan tyngir framvegis

Tá oljan var lægst fyri einum góðum ári síðan kostaði ein litur hjá skipunum um 70 oyru. Nú liggur og melir um tvær krónur og hetta merkir, at oljuútreiðslurnar eru tvífaldaðar seinasta árið

– Hetta hevur týdning fyri flotan og serliga rækjuflotan, sum brúkar nógva olju. Men oljuprísin fáa vit ikki gjørt nakað við, sigur Jákup Sólstein, formaður í Reiðarafelagnum.

– Tað er munandi tyngri hjá skipunum af fáa tað mala runt við dýru oljuprísunum. Rokningin uppá bunkringina tvífalda. Eg havi júst umbiðið eina bunkring til sjós í Eysturgrønlandi, har var prísurin 205 oyri. Prísurin liggur um tvær krónur í dag, hóast almenni prísurin er hægri, tí tey flestu skipini fáa avsláttur, sigur Jákup Sólstein.

je

Góðir brúktir frá REYNI SERVICE

TOYOTA CAMRY 2,2 GL AUTOMATIK
Skrás.: 28-06-96
Km.: 78.000
Prísur: 165.600,- **Garanti***

TOYOTA COROLLA 1,3 GLS H/B
Skrás.: 16-10-97
Km.: 57.000
Prísur: 98.600,- **Garanti***

TOYOTA CAMRY 2,0 GLI Sýnaður 10-00
Skrás.: 10-07-91
Km.: 129.000
Prísur: 69.600,-

TOYOTA COROLLA 1,8 DIESEL
Skrás.: 29-05-89
Km.: 263.000
Prísur: 48.600,-

TOYOTA AVENSIS 2,0 SOL
Skrás.: 23-06-99
Km.: 22.000
Prísur: 169.000,- **Garanti****

TOYOTA COROLLA 1,3 AUT. GEAR
Skrás.: 22-06-88
Km.: 116.000
Prísur: 29.600,- Sýnaður 11-00

TOYOTA CARINA E 2.0 GLI SEDAN
Skrás.: 24-08-95
Km.: 112.000
Prísur: 110.600,- **Garanti***

VOLVO 460 SEDAN
Skrás.: 25-05-90
Km.: 92.000
Prísur: 48.600,- Sýnaður 06-99

TOYOTA CARINA E 1,8 GLX
Skrás.: 27-11-97
Km.: 78.000
Prísur: 124.600,- **Garanti***

PEUGEOT 405 1,9 T-DIESEL Sýnaður 09-00
Skrás.: 10-01-96
Km.: 80.000
Prísur: 128.600,- **Garanti***

TOYOTA CARINA E 1,6 SEDAN Sýnaður 03-00
Skrás.: 30-05-94
Km.: 109.000
Prísur: 89.600,- **Garanti***

OPEL ASTRA 1,6 I STW.
Skrás.: 03-11-97
Km.: 35.000
Prísur: 110.600,- **Garanti***

TOYOTA CARINA 2,0 GLI
Skrás.: 08-03-89
Km.: 250.000
Prísur: 36.600,- **Garanti***

MAZDA 323 2,0 DIESEL
Skrás.: 01-05-98
Km.: 26.000
Prísur: 107.600,- **Garanti***

TOYOTA CARINA 1,6 XL
Skrás.: 21-06-89
Km.: 169.000
Prísur: 39.600,-

MAZDA 323 1.5 LX
Skrás.: 30-09-97
Km.: 99.000
Prísur: 80.600,- **Garanti***

TOYOTA COROLLA 2,0 DIESEL
Skrás.: 28-10-93
Km.:140.000
Prísur: 83.600,- **Garanti***

HYUANDAI ACCENT 1,5
Skrás.: 02-01-98
Km.: 25.000
Prísur: 79.600,- **Garanti***

TOYOTA COROLLA 1,6 LUNA L/B
Skrás.: 11-08-98
Km.: 17.000
Prísur: 132.600,- **Garanti****

RENAULT MEGANE 1,6 3 HURDAR Sýnaður 09-00
Skrás.: 22-05-96
Km.: 100.000
Prísur: 65.600,- **Garanti***

TOYOTA COROLLA 1,3 TERRA L/B
Skrás.: 30-09-98
Km.: 52.000
Prísur: 115.600,- **Garanti****

FORD ESCORT 1,6
Skrás.: 22-09-95
Km.: 87.000
Prísur: 74.600,-

TOYOTA COROLLA 1,3 SEDAN
Skrás.: 03-05-99
Km.: 34.000
Prísur:115.600,- **Garanti****

CITROEN BX DIESEL
Skrás.: 01-11-88
Prísur: 29.600,-

TOYOTA COROLLA 1,3 H/B G6
Skrás.: 19-11-98
Km.: 15.000
Prísur:124.600,- **Garanti****

FORD ESCORT 1,8 DIESEL
Skrás.: 16-08-91
Km.: 134.000
Prísur: 42.600,- Sýnaður 01-01

TOYOTA COROLLA 1,3 H/B
Skrás.: 20-04-99
Km.: 7.000
Prísur:114.600,- **Garanti****

* Brúktir bílar yvir 75.000 kr. verða seldir við BRÚ KTBÍLAVÁTAN.
** TOYOTA bílar hava 3 ára garanti frá fyrsta skrásetingar dato.

VØRUVOGNAR

MAZDA B-2500 PICK-UP DIESEL **Skrás.:** 11-05-00
Km.: 9.000 **Prísur:** 128.600,- **Garanti***

Sosialurin - 311820